

**TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** UG 156 **KM:** 56.000
**Árgangur:** 06.02.02 **Seinast sýnaður:** 06.02.02
**Viðmerking:** Klimaanlegg - fjarstýrt sentrallás - El-rútar/spegl - Radio/CD
**Útgjald: kr. 36.900,-** **Kr. 147.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA 5D H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MV 371 **KM:** 38.000
**Árgangur:** 14.08.02 **Seinast sýnaður:** 14.08.02
**Útgjald: kr. 34.900,-** **Kr. 139.000,-**



**TOYOTA CAMRY 2.2 I XL\GL**

**Skrásetingarnr.:** LF 544 **KM:** 221.000
**Árgangur:** 01.01.93 **Seinast sýnaður:** 05.04.04
**Kr. 40.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2,0 D-4D LINEA T STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HB 837 **KM:** 117.000
**Árgangur:** 08.03.01 **Seinast sýnaður:** 30.06.05
**Viðmerking:** Aircondition - Fjarstýrt sentrallás - Elrútar o.a.
**Útgjald. kr. 30.150,-** **Kr. 120.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DR 131 **KM:** 131.000
**Árgangur:** 22.07.98 **Seinast sýnaður:** 04.03.05
**Útgjald kr. 35.410,-** **Kr. 98.000,-**



**FORD FIESTA 1,25**

**Skrásetingarnr.:** NL 906 **KM:** 78.000
**Árgangur:** 05.06.02 **Seinast sýnaður:** 05.03.02
**Útgjald. kr. 18.650,-** **Kr. 74.000,-**

Fyrivarni ver ur tikingulfyri prentvillu



**TOYOTA YARIS 1,5 T SPORT 5D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** BR 822 **KM:** 40.000
**Árgangur:** 02.07.02 **Seinast sýnaður:** 02.07.02
**Útgjald kr. 31.400,-** **Kr. 125.000,-**



**FORD ESCORT 1,8**

**Skrásetingarnr.:** JV 127 **KM:** 198.000
**Árgangur:** 31.07.97 **Seinast sýnaður:** 14.01.04
**Kr. 45.000,-**



**TOYOTA AVENSIS SOL 2,0 TDi - Stw.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** VK 647 **KM:** 72.000
**Árgangur:** 21.01.99 **Seinast sýnaður:** 26.05.05
**Útgjald kr. 40.460,-** **Kr. 115.000,-**



**KIA SPORTAGE 2,0 4X4 Vørubilur**

**Skrásetingarnr.:** TL 334 **KM:** 86.000
**Árgangur:** 10.10.97 **Seinast sýnaður:** 06.12.04
**Kr. 35.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu

6 mánaða garanti

Vitbjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvábyrgd upp á kr. 500,-,
fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið ikki skyl
nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar el
tænastueftirlit.
Eingin gandur og ongir smáir bókstavir
Kom og vitja okkum · landsins bilbesta bilasølu.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F




*Síðani hósdagin hava ljóskurvarnar á vegamótinum R. C. Effersøesgøta og Bøkjarabrekka verið sløktar, og enn er brekið ikki loyst. Neyðugt verður kanska við serkønari hjálp úr Danmark.*

# Framvegis galið við ljóskurvunum

**Síðani hósdagin hava ljóskurvarnar í miðbýnum í Havn ikki virkað, og tað hevur sjálvsagt sett s ín dám á ferðsluna. Arbeitt hevur verið upp á brekið í fleiri dagar, men enn er trupulleikin ikki loystur**

LJÓSBREK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kemur fyri av og á, at ljóskurvarnar ikki virka, men vanliga gongur tað bara heilt stutt tíð, so er brekið rættað, og ferðslan gongur sína vanligu gongd aftur. Men líka síðani hósdagin hevur verið galið við ljóskurvunum á vegamótinum R. C. Effersøesgøta og Bøkjarabrekka í miðbýnum í Havn.

### Noyðast kanska at boðsenda donskum serfrøðingi

Tað er Gøtuljós-deildin hjá Tórshavnar Kommunu, ið varðar av ljóskurvunum, og har verður sagt, at teir framvegis ikki hava funnið út av, hvat brekið er.

- Vit vita ikki, hvat tað er, sum er í ólagi, men vit halda, at tað er nakað við sjálvum kortinum. Vit fara at royna einaferð enn í dag at vita, um vit fáa loyst trupulleikan. Gongur tað ikki, verður tað neyðugt hjá okkum at boðsenda sefrøðingi úr Danmark, var sagt hjá Gøtuljós mánamorgunin. Sagt verður, at av tí at tað er so sjáldan, at nakað er galið við ljóskurvunum, hava teir ikki so nógvar royndir í at arbeiða við hesum, og tí kann tað gerast neyðugt við serkønari hjálp úr Danmark.

### Ferðslan gongur væl

At ljóskurvarnar eru sløktar, kann skapa eitt sindur av ruðuleika í ferðsluni, men á politistøðini í Havn verður sagt, at tað hevur gingið bara heilt væl.

- Vit vóru úti fríggjamorgunin og eygleiddu ferðsluna, og tað vísti seg, at hon gekk bara heilt væl. Óivað gekk hon betur, enn tey flestu høvdu væntað. Tí hava vit valt ikki at blanda okkum ov nógv, so leingi sum ferðslan gongur so væl, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

# Stuldur av bili og traktori

**Leygardagin fekk løgreglan í Havn fráboðan um bæði ein bil og ein traktor, ið vóru stolnir í høvuðsstaðnum**

BRÚKSSTULDUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Løgreglan fekk fyrst boð um ein bil, ið var stolin í Eystrbýnum í Havn leygardagin. Stutt eftir at fráboðanin var komin, var bilurin funnin aftur nærheindis staðnum, har hann varð tikin.

Tá ið bilurin bleiv funnin aftur, kundi eigarin staðfesta, at hann hevði fingið nakað av skaða.

Eitt sindur seinni leygardagin bleiv boðað frá, at ein traktorur var stolin við Velbastaðvegin. Leitað var eftir traktorinum, og hann bleiv funnin aftur í vestrbýnum. Traktorurin hevði fingið stóran skaða, tá ið hann kom aftur í aftur.

# Royndi at snýta løgregluna

Ein bilførari, sum um vikuskiftað var tikin fyri at koyra við kenning , royndi at snýta løgregluna við at upplýsa falskt navn. Umframt at verða tikin fyri at koyra við kenning, hevði bilførarin einki koyrikort.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at tað er eitt álvarsligt lógarbrot at upplýsa falskt navn fyri løgregluni, tí tað kann hava við sær, at ein ósekur verður dømdur fyri nakað, ið viðkomandi ikki hevur gjørt. Maðurin, sum upplýsti falskt navn, verður tískil væntandi ákærdur fyri brot á revsilógina.

**tn**